gult24 cyan24 magenta24 svart24



# Kunngerð

## um broyting av Býarplaninum og byggisamtyktini fyri Runavíkar Kommunu

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 seinast broytt 13. mai 1997, verður við hesum boða frá, at Býráðið á fundi 12. juni 2001 hevur viðtikið at endurskoða býarplanin og Almennu byggisamtyktina fyri Runavíkar Kommunu.

Broytingarnar í býarplaninum og Almennu byggisamtyktini eru til skjals á býráðsskrivstovuni í upplatingartíðini frá 18. juni til og við 6. juli 2001.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu verða býráðnum í hendi ís einasta lagi 18. september 2001.




Saltangará, tann 14.06.2001

**Runavíkar býráð**

# Goymslumaður

Vit søkja eftir goymslumanni at byrja beinanvegin. Tað er ein fyrimunur um tú

- hevur trukkkoyrikort
- kennskap til teldur
- hevur skil fyri goymslustýring
- hevur góðan ordan í
- kann arbeiða yvirtíð

Send eina umsókn til

**Skipafelagið Føroyar**
Eystara bryggja
box 47
110 Tórshavn

Um tú vilt vita meir, ring til Viggo, tlf. 311225 og hoyr nærri.

**Skipafelagið Føroyar**

# Hjálparfólk til Dagstovnin í Gøtu

Fyri hjálparfólk í farloyvi verður søkt eftir einum hjálparfólki til barnagarðsstovu við 21 plássum, 4-6 ár

– at arbeiða 30 tímar um vikuna frá 1. august 2001 til 1. august 2002.

– Løn og setunarviðurskiftir annars eru sambært sáttmála við Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Torgerð Hansen, tlf. 442012 lok 10.

Skrivlig umsókn við avritum av prógvum, viðmælum o.a. skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. juli 2001.

**Dagstovnurin í Gøtu**
511 Gøtugjógv

**LØGMANSSKRIVSTOVAN**

# Starvslesandi í Brússel

## (Stagiaire)

Søkt verður eftir lesandi til Sendistovu Føroya í Evropasamveldinum. Starvstíðin er sett til at verða frá 1. september 2001 til 1. februar 2002 ella fyri lestrarhálvárið.

**Uppgávur**
Tann, ið settur verður, verður partur av dagligu arbeiðsgongdini á sendistovuni í samskiftinum við Evropasamveldið við serligum atliti at samskifti viðvíkjandi handli og fiskivinnu.

**Førleikakrøv**
Tann, ið settur verður, eigur at vera lesandi føroyingur við hægri háskúla, sum í minsta lagi hevur útbúgving á bachelor stigi.

Umsøkjarar eiga at hava góð samstarsevni, vera áhitnir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarar eiga harumframt at vera stinnir í føroyskum og enskum máli.

**Starvsstaðið**
Starvsstaðið er Sendistova Føroya í Evropasamveldinum, Brússel, sum er ein samrunnin partur av Løgmansskrivstovuni - uttanlandsdeildini.

**Setanartreytir**
Starvið verður skipað eftir teim reglum, ið eru galdandi fyri starvslesandi á staðnum. Starvið er ólønt. Tó verður veittur ókeypis bústaður.

Nærri upplýsingar eru at fáa við at venda sær til Herluf Sigvaldsson, deildarstjóra, tlf. +298 35 10 10.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum verða at senda

**Løgmansskrivstovuni**
Tinganes - Postsmoga 64
FO-110 Tórshavn
Føroyar

Telefax +298 35 10 15 E-mail: lms@fl.fo

og skulu verða á Løgmansskrivstovuni í seinasta lagi mánadagin 2. juli 2001.

***an kr an*** *er fyrisiting hjá løgmanni og varaløgmanni. Løgmansskrivstovan er skipað í tríggjar deildir og tvær eindir.* ***an an e n*** *hevur ábyrgdina av uttanlandsmálum, heruppií ES málum, millumtjóða samráðingum, norðurlandamálum, samráðingum við donsku stjórnina og protokol.*

# Dagrøktarmamma

Dagrøktarskipanin í Sørvágs kommunu søkir eftir dagrøktarmammu at byrja 20. august 2001.

Umsóknin skal sendast til Sørvágs kommunu áðrenn 09. juli 2001.

**Dagrøktin í Sørvági**

# GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

**Nissan Almera 2.0d GX**
grønur, 4 hurðar,
árg. 1997, 105.000 km.
**110.000**

**Nissan Almera 2.0d GX**
grønur, 5 hurðar,
árg. 1997, 75.000 km.
**110.000**

**Nissan Primera 1.6 LX**
vínreyður, 4 hurðar,
árg. 1996, 130.000 km.
**85.000**

**Nissan Primera 2.0 GX**
bláur, 4 hurðar
árg. 1997, 47.000 km.
**130.000**

**Nissan King Cab 2500**
bláur, 2 hurðar, diesel
árg. 1995, 100.000 km
**90.000**

**Nissan King Cab 2500**
grønur, 2 hurðar,
árg. 1996,
**120.000**

**Peugeot 405 GTX 1.9**
reyður, 4 hurðar,
árg. 1991, 70.000 km.
**50.000**

Sosialurin

**Ford Courier Van**
reyður, 3 hurðar,
árg. 1996, 41.000 km.
**65.000**

**Ford Courier Van**
reyður, 3 hurðar,
árg. 1996, 41.000 km.
**65.000**

**Opel Astra 1,6**
beige, 5 hurðar,
árg. 1996, 74.000 km.
**75.000**

**Opel Astra 1,7D Wagon**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1992,
**57.000**

**Opel Astra St.Car 1,6**
vínreyður, 5 hurðar,
árg. 1996, 65.000 km.
**90.000**

**Opel Corsa 1.4 16V Swing**
grønur, 5 hurðar,
árg. 1997, 44.000 km.
**80.000**

**Opel Vectra 1,6**
beige, 4 hurðar,
árg. 1996, 84.000 km.
**105.000**

**Peugeot 306 GR 1.6**
hvítur, 5 hurðar,
180.000 km.
**15.000**

**Peugeot 806 Van**
bláur, 5 hurðar,
árg 2000, 26.000 km.
**195.000**

**Toyota Carina 1.6**
hvítur, 4 hurðar,
árg. 1995, 103.000 km.
**96.000**

Bilarnir finnast eisini á:
**www.nissan.fo**

**P/F Meinhardt Arge**
v/ oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

**Sosialurin**
-tað loysir seg

# Vilja tygum við Í Býin

## - hvønn hósdag





# Starvsfólk til Fíggjardeildina

*"Tað er annað til í verðini enn pengar. Til dømis kekkar og kreditkort..."*
*Ókendur*



Til okkara Fíggjardeild verður søkt eftir einum fólki at byrja 1. september 2001 ella skjótast gjørligt.

Í Fíggjardeildini starvast 4 fólk. Uppgávurnar hjá tí, sum settur verður, vera í fyrstu atløgu at gera uppgerðir, avstemningar og eftirlitsarbeiðið í samband við mánaðarroknskapir, ársfjórðingsroknskapir og ársroknskapir eins og at luttaka í sjálvum roknskapararbeiðinum. Saman við hinum starvsfólkunum í Fíggjardeildini verður tú eisini við í menningini av niðanfyri standandi uppgávum:

- ársroknskapi og øðrum tíðarskeiðsroknskapum
- budgettum, budgettuppfylging v.m.
- gjaldførisuppgerðum
- viðlíkahaldi av annleggskartoteki, herundir uppfylging av íløgum
- uppfylging av tryggingum
- ger av skrivligum mannagongdum v.m.
- ymsum ad hoc uppgávum

Vit kunnu bjóða tær at starvast í einum mennandi og avbjóðandi umhvørvi.

**Útbúgving og førleikar hjá umsøkjarum:**
Tann, sum settur verður, skal hava góðan kunnleika og royndir innan bókhald og/ella roknskapararbeiði frá líknandi starvi ella frá grannskoðara. Eisini er tað fyrimunur, um viðkomandi hevur

- hollan EDV-kunnleika
- góð samstarvsevni
- evnir at arbeiða sjálvstøðugt

Lønin verður sambært avtalu millum Føroya Tele og avvarðandi yrkisfelag ella samsvarandi kvalifikatiónunum.

Gjøllari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Heina Joensen, fíggjarstjóra, tel. 303297 ella starvsfólkadeildina tel. 303030.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum ummælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. juni 2001.

Umsóknir skulu sendast til

**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

Tel 303030, fax 303031, www.tele.fo

Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt og hetta setur stór krøv til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

**FØROYA TELE**
*Skapið framtíðina saman við okkum!*

# Kaðalmontørur til Føroya Tele - Suðuroy

*"Eingin framtíð er í starvinum, framtíðin er í starvsfólkinum."*
*George Crane*



Søkt verður eftir kaðalmontøri til Føroya Tele í Suðuroy at byrja skjótast tilber. Á Føroya Tele í Suðuroy starvast íalt 9 fólk. Fólki søkt verður eftir, skal arbeiða í stóran mun við nýgerð og viðlíkahald av kaðalnetinum og telefoninstallatiónum.

**Vit kunnu bjóða eitt áhugavert arbeiði við atliti til:**

- nýgerð og viðlíkahald av kaðalnetinum og telefoninstallatiónum
- vanliga telefonútgerð
- innanhýsis kaðalskipanir
- uttanhýsis kaðalskipanir
- skráseting av kaðalneti
- annað fyrifallandi

**Útbúgving og førleikar hjá umsøkjarum:**
Elektronikmekanikari, elektrikari og/ella hollar royndir sum kaðalmontør.

Tað er ein fyrimunur, at tú í stóran mun kanst arbeiða sjálvstøðugt, er opin og dugir væl at samstarva og tosa við viðskiftafólk og hevur royndir innan EDV á brúkarastøði.

Arbeitt verður um alla Suðuroynna og uppmøtingarstaði er hjá Føroya Tele á Tvøroyri.

Starvið er lønt sambært sáttmála millum Føroya Tele og Starvsmannafelagið.

Gjøllari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Fróða Mortensen, økisleiðari tel. 371000 ella starvsfólkadeildina tel. 303030.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum ummælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. juni 2001.

Umsóknir skulu sendast til

**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

Tel 303030, fax 303031, www.tele.fo

Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt og hetta setur stór krøv til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

**FØROYA TELE**
*Skapið framtíðina saman við okkum!*

# Sosialurin

Lesið Sosialin
-tað loysir seg!